FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

**Svar**
**upp á**

**skrivligan fyrispurning nr. 40/2015 eftir tingskipanini § 52a frá Jørgen Niclasen, løgtingsmanni, um eftirlønaruppsparing hjá útisiglarum**

**Spurningurin var soljóðandi:**

1. Ætlar landsstýriskvinnan at broyta kunngerðina um eftirløn fyri fólk, sum arbeiða í útlandinum, so norska Folketrygd og aðrar eftirlønarskipanir eisini verða góðkendar av TAKS?

**Svar:**

**Til spurning 1**
Arbeiði við pensjónsnýskipan – har umboð fyri allar flokkar luttaka - er í gongd. Eftir ætlan verður uppskot til nýggja pensjónsskipan lagt fram í ár. Í hesum sambandi verða eisini ásetingarnar í Eftirlønarlógini endurskoðaðar.

Tað er rætt, at núverandi kunngerð – ið Jørgen Niclasen sum landstýrismaður í Fíggjarmálum setti í gildi – er soleiðis orðað, at hon hvørki góðkennir Folketrygd ella nógvar aðrar av teimum eftirlønarskipanum, sum føroyingar uttanlands rinda til.

Spuringurin um eftirlønargjald av uttanlandsinntøku má sigast at verða av alstórum týdningi, serliga um havt verður í huga, at ein stórur og vaksandi partur av føroyingum arbeiða uttanlands. So spuringurin verður sjálvandi eisini til umrøðu í arbeiðinum við pensjónsnýskipan.

Um broytingar verða í kunngerðini – ella hvørjar broytingar talan verður um – kann eg sjálvandi ikki at siga nakað endaligt um enn. Hetta veldst um hvørja semju funnið verður fram til í sambandi við pensjónsnýskipanina.

Fíggjarmálaráðið, 21 apríl 2016

**Kristina Háfoss,**
landsstýriskvinna

Kvíggjartún 1 • Box 2039 • FO-165 Argir
☏ (+298) 35 20 20 • 🖷 (+298) 35 20 25 • ✉ fmr@fmr.fo • www.fmr.fo